


# Kommunurnar størri ábyrgd



JACOB VESTERGAARD
Fólkaflokkurin

Alt síðan álitið frá kommunubólkinum varð handað í 1997/98, hevur verið tosað nógv um at styrkja kommunurnar, leggja uppgávur út og at arbeiða fyri einum greiðari ábyrgdarbýti millum land og kommunur. Nú 10 ár seinni mugu vit konstatera, at hetta álvarsmál í stóran mun ikki er komið longur enn til prát.

Ógreiða býtið millum land og kommunur er og hevur verið ein forðan fyri menning á ymiskum økjum. Fyri at taka eitt dømi av teimum mest týðandi úr rúgvuni, kann verða víst á eldraøkið, sum landið enn formliga eigur ábyrgd av, men ger sum minst við, og har kommunur – eisini orsakað av ov lítlum initiativi frá landinum – so lýðandi hava førkað seg inn á økið. Skal eitt slíkt vælferðarøki kunna prioriterast ordiliga og verða fevnd av nøkrum heldarætlanum fyri menning, so má eitt greiðari ábyrgdarbýti til. Ongin miðvís menning av hesum øki verður, so leingi talan bara er um hissini hálvar loysnir framdar av sperdum og ónøgdum kommunalum myndugleikum í mun til ógreiðar heimildir.

Hetta má broytast. Við útgangsstøði í lógini um sjálvbodnar kommunusamanleggingar og kommunal samstørv í sambandi við lógarbundnar uppgávur skal ítøkiligt ætlan gerast fyri, hvussu uppgávu- og ábyrgdarbýtið millum land og kommunur skal greiðast. Kommunurnar hava leingi vilja havt fleiri uppgávur at umsita og hava í ein ávísan mun longu fyrireika seg til hetta – m.a. innan nevnda eldraøkið – og bíða í veruleikanum bert eftir landsmynduleikanum.

Tá nú arbeiðið við at gera felags rokniskaparskipan er komið undir land, er gott høvi hjá landi og kommunum sum skjótast at fara undir at gera eina avtalu um, hvussu eldarøkið, fólkaskúlin og møguliga aðrar uppgávur, skulu flytast frá landinum til kommunurnar at umsita. Avtalan um útlegging skal innihalda eina greiða tíðarætlan fyri, hvussu uppgávurnar skulu flytast undir kommunalt málsræði, hvussu pengar skulu flyta við frá landinum og hvussu lóggávan skal skipast á ymisku økjunum.

Umsitingarliga hava okkara mangan ov smáu kommunur verið ov illa fyri til at taka sær av týðandi vælferðaruppgávum. Við lógini um sjálvbodnar kommunusamanleggingar og kommunal samstørv er stig tikið til at broyta hesi viðurskifti. Kommunurnar skulu, antin við bindandi samstarvi ella við samanlegging, skipa umsitingina soleiðis, at uppgávurnar verða røktar á fullgóðan hátt.

Við greiðari ábyrgdarbýti í sambandi við útlegging av uppgávum sleppa kommunurnar í størri mun at umsita sínar egnu borgarar, og uppgávurnar verða loystar tættari borgaranum, og fer hetta at geva eina betur tænastu, sum er betri tillagað tørvinum hjá tí einstaka. Hartil fer kommunala arbeiðið og kommunupolitikkur at fáa størri týdning, og vit fáa eitt nærdemokrati við veruligum innihaldi og týðandi myndugleikauppgávum. Umframt hetta er sannlíkt, at broytingin fer at hava við sær, at fleiri førleikakrevjandi størv verða stovnað í kommunalum høpi, og at okkara unga og vælútbúna fólk hevur okkurt at flyta aftur til úti í økjunum.

**Les meir á www.jacobvestergaard.blogspot.com**

# Við Fólkaflokkinum á odda kemur tunnilin sum avtalað



POUL KLEMENTSEN
valevni hjá Fólkaflokkinum

Nú valið nærkast hoyra vit nógvar meiningar um Sandoyar tunnilin, bæði við og ímót, sjálvandi skullu vit hava tunnilin og tað so skjótt sum gjørligt, Gamlarætt er nú 15 ár hon kom 10 ár ov seint, eisini kom Teistin 10 ár ov seint so lat okkum ikki eisini bara seta okkum uppafturá at bíða men halda fast um at byrjast skal í 2009. Fyri okkum sum her búgva er tað ikki bara tað at vit ikki tíma at sita í kø til Teistan og at vit bara vilja til Havnar, men at vit vilja bjóða okkara vinnulívi betri karmar at virka undir, tí sum nú er hava vit ongan møguleika at kappast við restina av landinum. Men ein av størstu orsøkunum til at fáa tunnilin sum skjótast er at fáa ungdómin at trívast, vit kunnu øll verða samd um at Sandoyggin er eitt paradís hjá børnum at at veksa upp í, men tá fólkaskúlin er liðugur eru ongi tilboð í oynni, við tunnilinum kunnu okkara ungu fáa útbúgving og verða búgvandi heima og eftir lokna útbúgving setast í búgv í oynni og arbeiða á meginøkinum.

Sandoyggja fólk hava ongantíð sett spurnartekin við hvat allir vegir- tunnlar og brýr um alt landi kostar okkum, tí er tað sera hugstoytt at hoyra hvat vit nú skullu kosta øllum ørðum.

Tað hava verði fleiri meiningar um hvar tunnilin skal koma upp, men lat okkum her í oynni ikki blíva ósamd um tað, lat serfrøðingarnar klára tað, lat okkum bara fáa tunnilin í oynna.

Onnur valevni í oynni koma nú fram við at tey eru trygd fyri at tunnilin kemur, men vit mugu minnast til at tað var landstýrismaðurin hjá Fólkaflokkinum sum legði uppskoti um tunnilin fram á Løgtingi

Løgtingsliminir hjá Fólkaflokkinum akvøddu allir fyri uppskotinum, og Fólkaflokkurin stendur við at tunnilin skal gerast sum avtala, so um tú vil hava trygd fyri at tunnilin kemur til ásettu tíð er bara eitt at gera, og tað er at velja Fólkaflokkin.

**Vel Fólkaflokkin tann 19 jan. Tín veruliga trygd fyri framburði í Sandoynni**

# Føroyska tjóðin og framtíðin



FRÍÐTÓR DEBES
Valevni Miðfloksins
Set x við H

Tað er mín sannføring, at í øllum spurningum og avgerðum eigur føroyska tjóðin at hava fullan avgerðarrætt og ábyrgd.

Sum valið nærkast, so verður dúgliga spurt og gitt, hvat ymsu flokkarnir standa fyri.

**1. Loysing/ fullveldi**
Sum støðan er ídag, so eru Føroyar í ríkisfelagsskapi við Danmark og Grønlandi. Men mín sannføring er, at vit eiga at arbeiða framm móti, at verða leys av øllum øðrum londum og standa á egnum beinum – á øllum økjum. Føroyar eiga at loysa frá Danmark – ongatíð ov skjótt. Men tað merkir tó ikki, at vit føroyingar ikki skulu hava samarbeiði við Danmark og Grønland. Sjálvandi skulu vit tað - men tó á jøvnum føti. At vit eisini í framtíðini koma at hava nógv samband við Danmark - tað er heilt náttúrligt, tá vit hugsa um hvussu nógvir føroyingar eru í Danmark. Eg trúgvi uppá, at tað ber til, at vit sum sjálvstøðug tjóð í framtíðini koma at hava eitt fyrimyndarligt samarbeiði/samhandil við Danmark. Hví ikki? Bæði Noreg og Ísland t.d. hava verið í ríkisfelagsskapi við Danmark og hava ídag eitt fínt samarbeiði við Danmark.

**2. Vinnan betri karmar**
At vinnan má hava betri karmar at arbeiða undir er eyðvitað. Komandi Løgting og Landstýri eigur at leggja stóra orku í at betra møguleikarnar hjá vinnuni – bæði á sjógvi og landi – at klára seg betur, eisini tá vit hugsa um okkara kappingarføri.

**3. Nýggjar vinnur**
Høvuðsvinna okkara er fiskivinnan og fer hon uttan iva, at verða tað leingi afturat. Gongst fiskivinnuni væl – ja, so gongst eisini Føroyum væl. Men. Vit eiga og mugu hyggja eftir øðrum alternativum nýggjum vinnumøguleikum fyri at hava fleiri bein at standa á, so sveiggini ikki eru so ógvuslig og sjónsk, sum tey eru ídag. Gongst tað væl í einari vinnu – so kann hon hjálpa uppá eina aðra, har tað kanska ikki gongur so væl.

Eitt komandi landsstýri eigur at seta alla orku í at kanna og seta á stovn nýggjar vinnur ella vinnu møguleikar – landi og fólki til gagns.

Tað burdi ikki verið ógjørligt, gjøgnum næsta valskeið at fingið nýggjar vinnur upp at standa.

# Átrúnaður/Demokrati/Politikkur



JASPUR LANGGAARD
Miðflokkurin

Eitt viðkomandi evni, sum javnan er frammi, er um átrúnaður og politikkur skulu ganga hond í hond ella um átrúnaður ikki hoyrir heima í politikki.

Hetta hevur stóran týdning fyri Miðflokkin, tí kristindómur er virðisgrundarlagið undir politikkinum hjá flokkinum. Tað má vera eitt ja-ligt tilknýti millum politikk og átrúnað og somuleiðis millum demokrati og átrúnað.

Hervið er ikki sagt, at vit ynskja at blanda okkara gudstrúgv, og tað at liva í hesum heimi. Í tí politiska arbeiðinum, er átrúnaður til staðar, men tað er ikki her gudstrúgvin verður skapt, tað verður hon í kirkjusamfeløgum og samkomum kring landið og hjá tí einstaka menniskjanum. Tí hevur tað týdning at vit ikki gera átrúna til politikk og politikk til átrúna.

Politikkur snýr seg um at skipa eitt samfelag á ein skynsaman hátt, meðan átrúnaður er sambandið millum eitt Gud og menniskjuna.

Tá ið talan er um demokrati, so merkir hetta fólkastýri ella fólkaræði. Her hava vit øll frælsi at velja hana ella hann, sum vit meina vil arbeiða fyri teimum virðum ið viðkomandi kann standa inn fyri.

Tín atkvøða vil hjálpa, soleiðis at hesi virðir verða varðveitt í landi okkara. Hetta er ikki ein sjálvfylgja, men nakað sum vit miðvíst mugu arbeiða fyri.

Øll valumboð hjá Miðflokkinum taka undir við hesum. Tí er tín atkvøða fyri Miðflokkinum trygd fyri, at hesi virði verða varðveitt til gagns fyri fólk og land okkara Føroyar.

**Set X við Miðflokkin**